## Kunngerð

Sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir verður við hesum gjørt kunnugt, at Tórshavnar býráð á fundi 13. desember 2007 samtykti broyting í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Ætlaða broytingin er, at uml. 360.000 $m^2$ av landbúnaðarøki á Glyvursnesi verður lagt til D2 ítróttarøki í sambandi við golfvøll.

Broytingin fevnir um part av matr. nr. 2, Kirkjubøur.

Tilfar, sum lýsir ætlaðu broytingina, liggur frammi í Snarskivuni á Vaglinum, frá 27. desember 2007 til og við 28. januar 2008, frá mánadegi til fríggjadag frá kl. 9.00 til kl. 16.00, hósdag tó til kl. 18.00.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot verða at senda Tórshavnar kommunu skrivliga í seinasta lagi 27. mars 2008.

**Tórshavnar kommuna**

HAK

Vit ynskja limum okkara við húski, og viðskifta fólki annars, eini góð og hugnalig jól, og eitt eydnuberandi nýttár, við tøkk fyri gott samstarv í skjótt farna ári.

**Havnar Arbeiðskvinnufelag**

HAK

Skrivstovan er stongd frá og við 21. desembur til og við 6. januar 2008

**Havnar Arbeiðskvinnufelag**

SEV

# Vilt tú hava ávirkan á el-trygdina?

**Eitt starv sum eftirlitsfólk í Vestmannaøkinum er leyst at søkja til setan skjótast tilber.**

**Starvið**
Tú kemur at samskifta við elinnleggjarar og hava eftirlit við nýggjum elinnleggingum, umframt skráseting av hesum í Norðurstreymoy, Vágum og Suðuroy. Ein partur av arbeiðinum verur framhaldandi dagføring av 5Amper mátianleggum kring landið, og at veita tekniska kundatænastu. Eisini kemur tú at gera stakroyndir av elmálarum og umsita málaragoymsluna hjá SEV. SEV hevur økisskrivstovur í Tórshavn, Vestmanna, Skálabotni, Klaksvík og Vági.

**Førleikar**
Umsøkjarar skulu hava prógv sum elinnleggjari, maskinmeistaraútbúgving við starvsroyndum innan eløkið ella samsvarandi útbúgving.Vit vænta at tú hevur góðar førleikar innan krøv og gerð av elinnleggingum, góð evni at samskifta og samstarva og ert fyrikomandi.

**Løn**
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum SEV og avvarandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Vinaliga send umsókn saman við prógvum og møguligum ummælum til:

Elfelagið SEV
Postrúm 319
110 Tórshavn

**Umsóknarfreistin er týsdagin 15. januar 2008.**

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Dánjal Jógvan Hansson á telefon nr. 346800.



# LOYSNIN!

**...ein lykil til alt húsið, virkið ella skúlan !!**

**Vit loysa lás- og lyklatrupulleikar.**

**Vit eru serkønir í at gera:**

Ruko systemlás · Skipan av lásum
Umvælingar · Skera lyklar til · Umskipa

**TÓRSHAVNAR LÁSASERVICE**
v/Jahn Petersen
**TEL 310 411 · FARTEL 215 411**
teldupostur: lasasmid@post.olivant.fo

## Kunngerð

Sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir verður við hesum gjørt kunnugt, at Tórshavnar býráð á fundi 22. november 2007 samtykti broyting í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Ætlaða broytingin er, at eitt økið uppá uml. 3.800 $m^2$ á Argjaboðagøtu verður broytt frá B3-vinnuøki til C3-øki til miðstaðarendamál.

Broytingin fevnir um matr. nr. 43h, 43i, 43m og part av litra a, Kirkjubø.

Tilfar, sum lýsir ætlaðu broytingina, liggur frammi í Snarskivuni á Vaglinum, frá 27. desember 2007 til og við 28. januar 2008, frá mánadegi til fríggjadag frá kl. 9.00 til kl. 16.00, hósdag tó til kl. 18.00.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot verða at senda Tórshavnar kommunu skrivliga í seinasta lagi 27. mars 2008.

**Tórshavnar kommuna**

## Kunngerð

Sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir verður við hesum gjørt kunnugt, at Tórshavnar býráð á fundi 13. desember 2007 samtykti broyting í setstøku byggisamtyktini fyri Nólsoy.

Ætlaða broytingin er, at uml. 6.000 $m^2$ av landbúnaðarøki verður lagt afturat A-sethúsaøkinum undir Bøbrekku, og uml. 200 $m^2$ av D-økinum eystan fyri skúlan, verður broytt til A-sethúsaøki.

Broytingin fevnir um partar av matr. nr. 108a, 159e, 107a, Nólsoy.

Tilfar, sum lýsir ætlaðu broytingina, liggur frammi í Snarskivuni á Vaglinum, frá 27. desember 2007 til og við 28. januar 2008, frá mánadegi til fríggjadag frá kl. 9.00 til kl. 16.00, hósdag tó til kl. 18.00.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot verða at senda Tórshavnar kommunu skrivliga í seinasta lagi 27. mars 2008.

**Tórshavnar kommuna**